

*Tað var sum í útlondunum, tá ið Road Racing kappingin fór av bakkastakki í Miðvági leygardagin. Allar súkklurnar stóðu klárar og bíðaðu eftir, at starturin skuldi fara.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Ein deymur av bensini og brendum gummi

**Áhugin fyri motorsúkklum og prutlum í Føroyum er støðugt vaksandi, og fyribrigdið Road Racing vinnur seg alsamt fram her á landi. Farna vikuskifti var kappast í Miðvági.**

ROAD RACING

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kappingin í Road Racing leygardagin var fyri prutl, sum hava í mesta lagi 50 kubikk. Kappast var í trimum bólkum - senior, old boys og kvinnur.

### Agnar er í serflokki

Í Miðvági var enn einaferð staðfest, at Agnar Dahl er í serflokki, tá ið tað kemur til kappkoyring her á landi. Hetta var triðja Road Racing kappingin í ár, og Agnar vann fyri triðju ferð á rað.

Óalmenn kapping um føroyameistaraheitið í Road Racing var eisini í fjør, og tá vóru fimm kappingar á skránni. Tá vann Agnar allar fimm kappingarnar, og alt bendir á, at hann ætlar at endurtaka bragdið í ár.

Kenneth Joensen gjørdist nummar tvey leygardagin, meðan yngri bróður Agnar, Rúni Dahl, gjørdist nummar trý. Á samlaðu stigatalvuni liggur Rúni tó framman fyri Kenneth Joensen, men langt er upp til Agnar Dahl í oddinum.



*Agnar Dahl prógvaði leygardagin enn einaferð, at hann er nógv tann besti føroyingurin á tveimum hjólum. Hann vann allar kappingarnar í fjør, og hann hevur eisini vunnið allar higartil í ár.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sera tætt hjá teimum gomlu Fimm mans vóru við í kappingini hjá Old Boys, og kappingin var rættuliga spennandi. Tá ið avtornaði var tað tó Hans M. Danielsen, ið fór avstað við sigrinum, meðan Anfinn við Hálsagarð og Jonny Thomassen komu á næstu plássunum.

Í samlaðu FM-kappingini er sera tætt millum fýra teir fremstu, og tí er einki avgjørt enn. Kartin Mikkelsen er á odda við 54 stigum, men bara fimm stig eru niður til Jonny Thomassen á fjórðaplássinum.

### Lítil spenningur hjá kvinnunum

Undirtøkan millum kvinnurnar er ikki eins góð hjá monnunum, men fýra kvinnur vóru so við í Road Racing kappingini í Miðvági leygardagin. Enn einaferð staðfesti Gurry Carlsdóttir, at tað liggur sera væl fyri hjá henni. Hon vann kappingina trygt, og harvið hevur hon vunnið allar tríggjar kappingarnar í ár. Maika Dahl gjørdist nummar tvey, meðan Conny Thomassen gjørdist nummar trý, og Barbara Husgaard nummar fýra.

Heilt fimm av fólki høvdu lagt leiðina framvið økinum í Miðvági, har koyrt var, og tað tykist sum um áhugin fyri hesari kappingargrein er vaksandi í Føroyum. Onkur av teimum føroysku koyrarunum hevur eisini verið í Danmark og tikið lut í kappingum har.

Føroysku kappkoyrararnir hava søkt myndugleikarnar um eitt øki, har teir regluliga kunnu fáast við hesa ítrótt, men tað hevur enn ikki eydnast teimum at fáa ávíst eitt stað frá myndugleikunum.

## Úrslit frá Road Racing í Miðvági

**Senior:**

| | |
|---|---|
| 1. Agnar Dahl | (Aprilia) |
| 2. Kenneth Joensen | (Aprilia) |
| 3. Rúni Dahl | (Aprilia) |
| 4. Heini Guttesen | (Derbi) |
| 5. Anfinn við Hálsagarð | (Aprilia) |
| 6. Allan Joensen | (Aprilia) |
| 7. Rói Poulsen | (Peugeot) |
| 8. Jákup Berg | (Peugeot) |

**Old Boys:**

| | |
|---|---|
| 1. Hans M. Danielsen | (Aprilia) |
| 2. Anfinn við Hálsagarð | (Aprilia) |
| 3. Jonny Thomassen | (Aprilia) |
| 4. Kartin Mikkelsen | (Aprilia) |
| 5. Bjarni Poulsen | (Peugeot) |

**Kvinnur:**

| | |
|---|---|
| 1. Gurry Carlsdóttir | (Aprilia) |
| 2. Maika Dahl | (Aprilia) |
| 3. Conny Thomassen | (Aprilia) |
| 4. Barbara Husgaard | |

## Road Racing stigatalvur

**Senior:**

| Navn: | Stig: |
|---|---|
| 1. Agnar Dahl | 75 |
| 2. Rúni Dahl | 48 |
| 3. Heini Guttesen | 46 |
| 4. Kenneth Joensen | 40 |
| 5. Allan Joensen | 32 |
| 6. Rói Poulsen | 19 |
| 7. Jákup Berg | 16 |
| 8. Tórolvur Samuelsen | 11 |
| 9. Anfinn við Hálsagarð | 11 |

**Old Boys:**

| Navn: | Stig: |
|---|---|
| 1. Kartin Mikkelsen | 54 |
| 2. Anfinn við Hálsagarð | 53 |
| 3. Hans M. Danielsen | 50 |
| 4. Jonny Thomassen | 49 |
| 5. Bjarni Poulsen | 27 |

**Kvinnur:**

| Navn: | Stig: |
|---|---|
| 1. Gurry Carlsdóttir | 75 |
| 2. Conny Thomassen | 45 |
| 3. Maika Dahl | 40 |
| 4. Birita Ellevang | 36 |
| 5. Birita Bláhamar | 13 |
| 6. Barbara Husgaard | 13 |